gult16 cyan16 magenta16 svart16



## Dansur aftur í Lognbrá

Norðoyastevnan bjóðar diskotek og dans av ymsum slagi. Fríggjakvøldið og leygarkvøldið verður diskotek í KÍ-høllini. Sunnukvøldið verður dansur í Lognbrá, sum annars hevur verið afturlatið seinastu mánaðirnar.

Klaksvíkar Klubbi hevur dans somu kvøld. Fríggjakvøldið og sunnukvøldið spæla fuglfirðingarnir Njál og Mourits, og leygarkvøldið eru Fluffy Toys á skránni.




# Halda stevnu á hjólum




*Jákup Jacobsen og Osmund Østerø eru tveir av motorsúkklumonnunum í Norðoyggjum. Jákup situr á síni Yamaha FZR1000, og Osmund á síni Honda CPR1000F*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

**Leygardagin møtast motorsúkklufólk í Klaksvík, har tey fara at halda norðoyastevnu á hjólum**

EASY RIDER

*Eyðun Klakstein*

Fólk við serligum tokka til motorsúkklur hittast í sambandi við norðoyastevnuna í Klaksvík um vikuskiftið.




Leygardagin koma tey úr ymsum ættum, og ætlanin er, at tær mongu motorsúkklurnar skulu buldra avstað norður til Kunoyar og til Viðareiðis.

- Eingin kemur vanliga til Klaksvíkar at koyra á motorsúkklu. Tað er ikki serliga lokkandi at koma hendanvegin at koyra, men í sambandi við norðoyastevnuna hevur áhugin verður stórur fyri hesum treffinum, sigur Jákup Jacobsen, sum er ein av klaksvíkingunum, sum dámar at koyra á tveimum hjólum.

- Tá vit hittust í Havn í mai mánaði, vísti tað seg, at áhugin fyri at koma á norðoyastevnu var stórur. Eg vóni, at vit verða eini 30, men tað veldst sjálvandi um, hvussu veðrið verður, sigur hann.

*– At koyra á motorsúkklu er meiri ein lívsstílur, enn tað at koyra bil, heldur Jákup Jacobsen*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

### Í øllum aldri

Tað eru serliga menn, sum hava tokka til motorsúkklur, men tað er eisini einar tvær kvinnur, sum plaga at verða við til treffini.

- Vit eru í øllum aldri. Tá vit hittust í Havn seinast, var tann yngsti 19 ár, meðan tann elsti var farin um tey 80, sigur Jákup Jacobsen.

Tað eru eisini alskyns sløg av motorsúkklum, sum koyra á føroysku vegunum. Yamaha, Honda, Suzuki, Kawasaki og Harley Davidson rópast merkini, og eisini onkur av teimum gomlu BSA og Nimbus eru at finna í rúgvuni.

- Tey, sum eiga motorsúkklur, ganga høgt upp í at halda tær við líka. Tað hoyrir líka sum til, at hevur tú eina motorsúkklu, so ansar tú væl eftir henni og hevur hana í góðum standi, sigur Jákup Jacobsen.

- Um veturin liggur ikki so væl fyri at koyra, og tá kunnu vit ístaðin ganga og pussa og polera súkklurnar.

### Øðrvísi á motorsúkklu

Jákup Jacobsen er ein av fimm ella seks klaksvíkingum, sum koyra nógv á motorsúkklu. Teir eru javnan túrar í meginøkinum, og onkrir túrar verða sjálvandi eisini koyrdir norðanfyri.

- At koyra á motorsúkklu er meiri ein lívsstílur, enn tað at koyra bil. Tú ert á ein hátt nærri náttúruni, og tað fært øðrvísi upplivilsi, tá tú koyrir. Og so er tað ikki at gloyma, at tú ert einsamallur á súkkluni, meðan tú ofta hevur fólk við í bilinum, sigur hann.

- Fólk viðmerkja ofta, at tað má verða kalt at koyra á motorsúkklu, men tað er tað ikki, um tú hevur røttu klæðini.

Motorsúkklurnar hava stóran og orkufullan motor, men tað snýr seg meiri um at koyra, enn um at koyra skjótt, hóast Easy Rider kann koma í onkran við hvørt.

Jákup Jacobsen verður ikki keddur av tí, um mongu motorsúkklurnar í Klaksvík leygardagin fara at loypa brell á onkran klaksvíking.

Fólk eru altíð vælkomin uppí rúgvuna av motorsúkklufólki.

gult17 cyan17 magenta17 svart17



